# Størv í Eik

1 virðisbrævarøktara/greinara til Eik Markets
2 búskaparfrøðingar til Fíggjardeildina



Eik

**Virðisbrævarøktara/greinari til Eik Markets**
Fyri at veita kundum okkara, størri sum smærri, eina framúr góða ráðgeving, sóknast vit eftir einum virðisbrævarøktara/greinara (analytikara), ið skal stuðla kundaráðgevum okkara, so hesir kunnu veita kundunum bestu ráðgeving.

Vit hugsa okkum, at tú
- ert útbúgvin cand. polit., cand. oecon., cand. merc. ella líknandi. Lesandi, sum eru um at verða liðug við útbúgvingina, eru eisini vælkomin at søkja
- hevur góð analytisk evni og gott flair fyri tølum (ræðist ikki støddfrøði)
- hevur royndir innan lánsbrævamarknaðinum/ partabrævamarknaðinum (hetta er ein fyrimunur, men tó eingin treyt) og áhuga fyri marknaðinum

Hevur tú spurningar, kanst tú venda tær til leiðaran fyri Eik Markets, Sverri Justinussen, tlf. 348611, teldupost sverri.justinussen@eik.fo ella til starvsfólkaleiðaran, Marjun Eystberg, tlf. 348510, teldupost marjun.eystberg@eik.fo.

**Búskaparfrøðingar til Fíggjardeildini**
**Búskaparfrøðingur – roknskapur**
Sum børsskrásett fyritøka hava vit skyldu at almannakunngera okkara roknskapir hvønn ársfjórðing, og sum búskaparfrøðingur á Fíggjardeildini verður tú við til at fremja hetta í verki. Krøvini til børsskrásettar fyritøkur herðast og í tí sambandi skulu vit innan 1. januar 2009 leggja um til IFRS roknskaparreglurnar. Eisini hetta verður partur av tínum arbeiðsuppgávum. Til starvið krevst

- gott innlit í roknskaparreglurnar
- royndir frá líknandi starvi, t.d. sum grannskoðari

**Búskaparfrøðingur - fíggjarstýring**
Fíggjadeildin søkir eisini eftir búskaparfrøðingi, sum m.a. skal

- hava eftirlit við fíggjarætlanum fyri Eik Banka P/F og einstøku deildirnar
- ráðgeva, fyriskipa og vera við til at uppbyggja fíggjarstýringina í samtakinum

Rætti umsøkjarin hevur ananlytisk evni og royndir frá líknandi starvi

Hevur tú spurningar, kanst tú venda tær til leiðaran fyri Fíggjardeildini, Finn Danberg, tlf. 348610, teldurpost finn.danberg@eik.fo ella til starvsfólkaleiðaran, Marjun Eystberg, tlf. 348510, teldupost marjun.eystberg@eik.fo.

Størvini verða sett sum skjótast og umsóknir skulu vera Eik í hendi í seinasta lagi 27. juli 2007 og sendast:

Eik Banki P/F
att. Marjun Eystberg,
starvsfólkaleiðari
Yviri við Strond 2
100 Tórshavn

**Les meira um størvini á**
www.eik.fo

Eik er ein nútímans fyritøka, og við 175 árum á baki er Eik elsti peningastovnur í landinum. Eik-samtakið eigur dótturfeløgini Inni og Eik Bank Danmark í Keypmannahavn. Seinni í summar gerst danski internet bankin SkandiaBanken partur av Eik-samtakinum. Við keypinum av SkandiaBanken telist Eik millum 15 teir størstu bankarnar i ríkinum.

# Leiðari til Telebúðina í Tórshavn

„Ein fyritøka, sum bara vinnur pening, er ein vánalig fyritøka"

- Henry Ford -

**Søkt verður eftir leiðara til Telebúðina í Tórshavn at byrja skjótast gjørligt**

Telebúðin í Tórshavn er ein av seks Telebúðum kring landið. Telebúðin hevur ment seg nógv, og ætlanirnar fyri framtíðina eru stórar.

Til rætta fólkið er talan er um eitt avbjóðandi starv. Arbeitt verður í einum krevjandi og mennandi umhvørvi, har stórur dentur verður lagdur á góðan handilsskap og eini tráan eftir at veita eina skjóta og munagóða tænastu.

Leiðarin av Telebúðini hevur ábyrgdina av allari sølu og tænastustøðinum - harafturat er leiðarin partur av Teledepilstoyminum.

**Vit vænta, at umsøkjarar hava:**
- Leiðslueginleikar og -royndir
- Góðan førleika at fara við fólki – starvsfólki og kundum
- Dirvi og áræði at taka tøk og røkka ásettum málum
- Evni at samstarva við ymiskar starvsbólkar
- Kunnleika um kunningartøkni og/ella samskiftistøkni

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið galdandi fyri Føroya Tele.

# Lærlingur til Telebúðina í Tórshavn

**Søkt verður eftir lærlingi til Telebúðina í Tórshavn at byrja skjótast gjørligt.**

Til Telebúðina í Tórshavn søkja vit eftir einum lærlingi, sum skal luttaka í øllum uppgávum, ið skulu til fyri at viðskiftafólkið fær eina góða tænastu. Til rætta fólkið hava vit eitt sera spennandi læruupláss.

**Til læruplássið ynskja vit fólk við:**
- førleika at seta seg inn í nýggja tøkni
- evnum at samstarva við ymiskar samstarvsbólkar
- ídni at røkka ásett mál
- HH, HF, HT ella studentsprógvi

**Lærutíðin er:**
- 2 ár við HH
- 2½ ár við studentsprógvi, HF ella HT

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið galdandi fyri Føroya Tele.

Telebúðin í Tórshavn er opin allar vanligar handilstíðir og arbeitt verður í skiftum við hini starvsfólkini í handlinum.

Gjøllari upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Høgna Vilhelmsen, hvi@ft.fo, ella Starvsfólkadeildina á Føroya Tele

Umsóknarfreist til bæði størvini er mánadagin 23.juli 2007. Umsóknir skulu stílast til:

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn



**FT Samskifti er dótturfelag í Føroya Tele. Í felagnum er øll kundarøkt, øll søla og alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-samskifti og øll støðarútgerð fyri fastettelefoni og breiðband. Í felagnum starvast 115 fólk. Tænastur frá FT-Samskifti verða markanaðarførdar undir navninum Føroya Tele.**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*